# Føroya Reiðarafelag
# Formansfrágreiðing 2006

## Ein lýsing av gongdini hjá veiðiflotanum.

Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

# Formansfrágreiðing 2006

## Um felagið:

### Endamál felagsins

Føroya Reiðarafelag varð stovnað 15. desember 1908. Endamál felagsins er at savna føroyskar reiðarar og at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum fiskiskipum, eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna.

### Limaskapur

Fiskifør yvir 20 BRT. kunnu gerast limir í felagnum, og reiðarar kunnu venda sær til felagið fyri at biðja um limaskap. Tað er tó vorðið siðvenja, at einans størru skipini eru limir - ella bert tey skip, ið sáttmálar verða gjørdir fyri við manningarfeløgini

### Arbeiðsøki

- At gera og umsita sáttmálar við manningarfeløgini
- At vera við í samráðingum um kvotabýti við onnur lond
- At samráðast um keyp av fiskirættindum frá øðrum londum og umsiting av hesum
- At umboða limirnar mótvegis myndugleikum
- At fáa til vega taltilfar og viðgerð av tí
- At kunna limirnar um mál av felags áhuga

**Limatal 2006**

| Veiðibólkur | Skipatal |
|---|---|
| Línuskip, ísfisk | 24 |
| Lemmatrolarar | 13 |
| Smáir trolarar | 2 |
| Partrolarar | 24 |
| Rækjuskip | 3 |
| Nótaskip | 8 |
| Ídnaðarskip | 2 |
| Verksmiðjutrolarar | 6 |
| Garnaskip | 6 |
| Frystitrolarar | |
| Samlað limatal: | 88 |

**Limagjald 2006**

| Stødd bt. | Árligt gjald |
|---|---|
| 0 - 399 | kr. 8.000 |
| 400 - 599 | kr. 10.000 |
| 600 - 999 | kr. 12.000 |
| 1000 - 1899 | kr. 15.000 |
| 1900 - | kr. 20.000 |

## Nevndin í Føroya Reiðarafelag:

Í nevndini sita 7 limir, tveir fyri Streymoy, tveir fyri Suðuroy, ein fyri Vágoy og ein fyri Norðuroyar, ið aðalfundurin velur millum felags-limirnar fyri 3 ár í senn. Reiðarar fyri fiskifør yvir 20 bruttotons kunnu gerast limir í felagnum við at venda sær til felagið og um nevndin játtar teimum limaskap.


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

# Formansfrágreiðing 2006

**FORMANSSKAPUR:**
Jákup Sólstein, Klaksvík, formaður
Viberg Sørensen, Tvøroyri, næstformaður

**NEVND:**
Poul Hansen, Tórshavn
Petur Jacobsen, Tórshavn
Jónsvein Knudsen, Saltangará
Gudmund Mortensen, Tvøroyri
Ólavur Petersen, Sørvágur

**Skrivari:**
Ólavur Jøkladal, Hoyvík

**TILTAKSLIMIR:**
Palli Ziskasen, Klaksvík
Johan Joensen, Kollafjørður
Jóhannus M. Olsen, Toftir
Bogi Mortensen, Vágur
Holdan Gudmundsen, Sandavágur

Á aðalfundi í dag varð gjørt av, at verandi nevnd heldur fram til ein komandi eykaaðalfund síðst í september, ella miðjan oktober. Tað er so ætlanin, at bygnaðarbroytingar fara fram á komandi eykaaðalfundi, har farið verður frá at velja nevndarlimirnar eftir øki, til í staðin fyri, at hvør høvuðsskipabólkur fær sítt umboð í felagnum. Hetta verður mett, at styrkja felagið við atliti at umboðan og eisini sum ein profilering úteftir.

## Virksemi Reiðarafelagsins annars

Føroya Reiðarafelag umboðar limirnar í ymiskum nevndum og arbeiðsbólkum:
**Umboðan felagsins í ráðum og nevndum:**
**Fastar nevndir og ráð:**

- Stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina — Jákup Sólstein
- Fasti Gerðarættur – dómari — Poul Hansen
- Fasti Gerðarættur – nevndarlimur — Jákup Sólstein
- Sjóvinnuráðið — Jákup Sólstein
- Arbeiðsmarknaðarráðið — Ólavur Jøkladal
- Realurin
- Ráðið fyri Menningarstovuna
- Ráðið fyri Fiskivinnuroyndir
- Fiskidaganevndin — Dánjal Jacobsen
- Fiskivinnuráðið — Osmund Justinussen
- Samstarvsnevndin (Skipaeftirlitið) — Ólavur Jøkladal
- Útbúgvinarráðið — Ólavur Jøkladal


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

# Formansfrágreiðing 2006

**Fyribilsnevndir og arbeiðsbólkar:**

| | |
|---|---|
| • Arbeiðsbólkur um loysn á arbeiðstrætum (arbeiðsrætt) | Poul Hansen |
| • Arbeiðsbólkur til endurskoðan av ALS | Jákup Sólstein |
| • Arbeiðsbólkur til endurskoðan av barsilsskipan | |
| • Arbeiðsbólkur til endurskoðan av innviging av fiski | |
| • Fyrireiking av samráðingum um fiskiveiðuavtalur | |
| • Luttøka í samráðingum um fiskiveiðuavtalur | |
| • Arbeiðsbólkur at fyrireika eftirlønarviðurskiftir | |

Felagið tekur sær av samskifti við myndugleikar, felagsskapir og feløg her heima og í útheiminum. Niðanfyri eru nøkur dømi nevnd, ið lýsa hetta virksemi.

**Samskifti við føroyskar myndugleikar:**

**Viðgerð av broytingum í lógum og reglugerðum:**

- Fiskivinnuráðið
- Vinnumálaráðið
- Mentamálaráðið

**Samskifti við feløg:**

- Umsiting av Ráfiskaseljarafelagnum
- Umsiting av Felagnum Nótaskip
- Umsiting av felagnum Trolskip
- Umsiting av felagnum Garnaskip

## Inngangur

Formansfrágreiðingin verður løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Reiðarafelag hin 20. juni 2007. Reiðarafelagið er eitt áhugafelag hjá reiðarnum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku skipabólkarnar og feløg teirra, myndugleikar og stovnar, ið vara av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Nólsoyarstovu og hevur felags umsiting við Føroya Ráfiskaseljarafelag.
Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiskivinnuni og virksemi felagsins í árinum, ið farið er.

## Limir í Føroya Reiðarafelag eru:

| | |
|---|---|
| **Nótaskipini** | **Garnaskipini** |
| **Trolskipini** | **Djúpvatnstrolararnir** |
| **Línuskipini** | **Ídnaðarskipini** |
| **Rækjuskipini** | **Verksmiðjutrolararnir** |


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

## Gongdin í Føroysku fiskivinnuni

Gongdin hjá føroysku fiskiskipunum fyri árið 2006, tá ið útróðrabátarnir ikki eru taldir við, er betri enn árið frammanundan, um vit bera saman veiðivirðini, sama ger seg galdandi fyri veiðinøgdin, umenn ikki í sama mun.



### Veiðinøgd, veiðvirði í tíðarskeiðnum 2004-2006

Samanburður millum 2004-2006

| Skipabólkur | 2004 | 2005 | 2006 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Nøgd | Nøgd | Nøgd | Virði | Virði | Virði |
| | (1000 tons) | | | (1000 kr.) | | |
| Rækjuskip | 8.662 | 6.925 | 4.104 | 102.975 | 75.380 | 56.602 |
| Verksmiðjutrolarar *) | 19.604 | 20.282 | 26.108 | 371.130 | 399.077 | 555.536 |
| Nótaskip | 350.634 | 311.808 | 350.809 | 371.487 | 415.880 | 578.974 |
| Ídnaðartrolarar | 29.467 | 25.158 | 26.929 | 19.038 | 18.810 | 41.213 |
| Línuskip | 22.049 | 20.784 | 19.689 | 240.184 | 264.225 | 289.660 |
| Partrolarar | 44.961 | 61.441 | 59.537 | 216.683 | 284.653 | 323.703 |
| Lemmatrolarar**) | 19.752 | 22.078 | 23.300 | 209.224 | 236.543 | 221.380 |
| Garnaskip | 2.294 | 2.580 | 2.218 | 49.737 | 65.556 | 65.888 |
| **Tilsamans** | **497.423** | **471.056** | **512.694** | **1.580.458** | **1.760.124** | **2.132.956** |
| Munur í % | | (5,30) | 8,84 | | 11,37 | 21,18 |

*) ein svartkjaftatrolari íroknaður

**) Incl. Tveir smáar lemmatrolarar

Allar nøgdir eru í túsund tonsum og øll veiðivirði eru í túsund krónum

**Rækjuskipini** Her vóru bert trý skip til fiskiskap í fjør, og úrslitið hjá teimum var vánaligt. Tvey av skipunum hava verið hart rakt av óhappum í fjør, og hevur hetta havt við sær stórar avleiðingar fyri úrslitið. Atlantic Navigator er við í hesum bólki og var bruttosølan hjá honum var 158 milliónir.

**Verksmiðjutrolararnir** høvdu eitt framúr gott ár í 2006, og gjørdist avreiðingarvirðið góðar 150 milliónir krónur hægri enn árið frammanundan. Veiðan í Barentshavinum var ikki serliga góð, tó at prísirnir hava verið sera góðir. Fiskiskapurin í Irmingarhavinum og í altjóða sjógvi norður úr Føroyum eftir

kongafiski, hevur verið góður og prísurin var eisini góður. Tað varð keypt ein lítil kvota frá Russarum.




**Nótaskipini** høvdu eitt metjár, tóat tey fiskaðu nøkurlunda tað sama í nøgd í árinum 2006 sum 2004, samanborið við eitt munandi fall árið 2005, men ein munandi øking í kiloprísinum hevur skapað eina virðisøking uppá meira enn 160 milliónir krónur sama tíðarskeiðið, samanborið við 2005.

**Ídnaðartrolararnir** hava í veiðinøgd fiskað tað sama sum 2005, meðan veiðvirðið er økt meira enn tað dupulta. Hetta kemst mest av at prísurin er hækkaður nógv á svartkjafti. Ídnaðarskipið Carlton hevur fiska nógv í 2006. Tað eru bert tveir ídnaðartrolarar eftir í drift, og teir hava tað ógvuliga trupult.

**Línufiskiskapurin** hevur seinastu árini verið fallandi, hvat veiðinøgd viðvíkur, soleiðis eisini fyri árið 2006, tó at virðisøkingin hevur verið hampulig samsvarandi hækkandi fiskaprísum. Tað merkir fyri línuskipini, at veiðivirðið er vaksið við einum 25 milliónum krónum, hóast minni hevur verið fiskað. Fallið seinastu tvey árini hevur verið knøpp 2.400 tons, og er komið niður á eitt støði undir 20 túsund tons.

**Partrolararnir**: Fiskiskapurin hjá partrolarum í 2006 hevur verið rættiliga góður, ella nøkurlunda á sama stigi sum í 2005, sum var metár hjá bólkinum í veiðinøgd. Prísvøksturin hevur havt við sær eina virðisøking uppá slakar 40 milliónir krónur, meðan veiðinøgdin er minkað nakað – eini 2 túsund tons. Virðisøkingin kann góðskrivast betri prísi uppá upsa.

**Djúpvatnstrolararnir:** Fiskiskapurin hjá djúpvatnstrolarunum hevur verið sløk 3.000 tons hægrið enn í 2005, og við einari afturgongd í veiðivirði uppá 15 milliónum krónum. Hetta kemst fyri tað mesta av eini lakari toskaveiði á rygginum ímillum Føroyar og Ísland. Hesin skipabólkur hevur tað ógvuliga tungt vegna prísin á olju, sum teir brúktu lutfalsliga nógv av.

**Garnaskipini** høvdu eitt fall uppá 360 tons í veiðinøgd í 2006 samanborið við 2005, tað merkir niður aftur á eina nøgd, ið liggur beint undir tí sum fiskað varð í 2004 og veiðivirðið gjørdist tað sama sum í 2005. Tað er mest sum eingin veiða eftir svartkalva í hesum bólkinum, tá hjáveiðitrupulleikin er ein forðing.
Sum sæst av talvuni, so er eins og undanfarna ár størri hækking í veiðivirðinum, enn veiðinøgdini. Hetta kemst av, at prísirnir á flestu fiskasløgum er farin upp.


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

# Formansfrágreiðing 2006

Samlaða nøgdin hjá øllum skipabólkum í 2006 samanborin við 2005, sum eru í Reiðarafelagnum er hækkað við 41.000 tonsum, svarandi til eina hækking av 9% í mun til árið frammanundan, meðan veiðivirðið er hækkað við 370 milliónum krónum, svarandi til eina hækking uppá 21%. Hýrurnar eru øktar frá 619 milliónir krónur til 747 milliónir, svarandi til eina hækking uppá 21%.



## Tilráðingin og løgtingssamtyktin

Nú hevur so aftur verið umrøtt, hvussu nógvir fiskidagar skulu tillutast hvørjum bólki á føroysku landleiðini og hevur tað nýliga víst, at partarnar standa langt frá hvør øðrum. Annar parturin – kemur við boðum frá ICES um, at sera illa stendur til við toskastovnunum, og tí má dagatalið hjá skipunum skerjast heili 40%, hóast tað er nokk av hýsu og upsa. Tá ICES byggir sína støðutakan á tilráðing frá fólki, ið dagliga starvast á fiskirannsóknarstovuni, so er jú einans talan um at goyma seg aftan fyri ein altjóða stovn, ið sigur tað, tú vilt hava hann at siga.

Tað hevur alstóran týdning, at føroyskir løgtingsmenn skilja endamálið í fiskidagaskipanini – at hon er ein sjálvregulerandi skipan. Teir eiga ikki at taka við ráðunum, og ikki ogna sær ta fatanina, ið sigur, at tað er neyðugt at skerja fiskidagar á hvørjum árið vegna effektivisering. Teir eiga at halda fast við sjálva grundhugsjónina í skipanini, at hon er sjálvregulerandi.

Vit eiga at taka avleiðingarnar av tí, vit halda um okkara fiskidagaskipan. Vit eru stolt av hesi skipan, hetta vísir seg ofta, tá vit eru saman við fólki frá øðrum tjóðum. Vit halda okkum vera fyridømi fyri aðrar, so mugu vit eisini trúgva uppá skipanina.

Tað kemur at hava alt ov stórar samfelagsligar avleiðingar við einum drastiskum niðurskurði, samfelagið kann ikki bera tað. Ikki bert er talan um skipabólkar, men eisini virki, ið skulu liva av fonginum. Ov nógv verða rakt beinleiðis, og enn fleir óbeinleiðis og harafturat samfelagið alt, ið hevur fiskivinnuna sum sítt høvuðsvinnuna og inntøkuna. Vit eiga ikki at gloyma at 90 prosent av okkara fiski er eksportur, og at fiskaúrdráttirnir eru 65 prosent av samlaða útflutninginum. Í burðardyggari vinnu verður ikki bert talað um umhvørvisligar avleiðingar ella fíggjarligar avleiðingar, men eisini sosialar avleiðingar. Hetta seinasta eigur eisini yvir fyri øðrum at telja við. Myndir úteftir eigur eisini at vera, at menniskju, ið liva av fiskivinnuni hava tryggar karmar og ikki gerast arbeiðsleys.


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

# Formansfrágreiðing 2006

Tí fer Føroya Reiðarafelag enn einaferð at heita á teir, ið á hvørjum ári skulu gera av talið á fiskidøgum, um ikki at máa støðið undan skipanini við einvíst at skerja fiskidagarnar.

Tað verður ein nógv størri nøgd fiskað av øðrum fiskasløgum í 2006, enn í 2005. Eisini av øðrum botnfiskasløgum, verður fiskað meira av í 2006, enn árið frammanundan. Fara vit harafturímóti yvir til tosk, hýsu og upsa, so verða nógv minni nøgdir fiskaðar í 2006, enn 2005, serstakliga ger hetta seg galdandi fyri toskin, ið verður veiddur av heimaflotanum, har fallið er uppá 5.300 tons, nevniliga frá 18.600 tonsum niður í 13.900 tons.



Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2005-2006 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskaslag | 2005 | 2006 | 2005 | 2006 | 2005 | 2006 |
| Toskur | 18.879 | 13.599 | 340.222 | 263.096 | 18,02 | 19,35 |
| Hýsa | 19.977 | 16.574 | 198.704 | 201.311 | 9,95 | 12,15 |
| Upsi | 62.077 | 60.140 | 248.494 | 314.116 | 4,00 | 5,22 |
| Annar botnfiskur | 12.701 | 15.954 | 114.624 | 178.970 | 9,02 | 11,22 |
| Flatfiskur tils. | 7.214 | 7.032 | 191.771 | 200.698 | 26,58 | 28,54 |
| Onnur fiskasløg tils. | 13.900 | 20.886 | 52.570 | 89.456 | 3,78 | 4,28 |
| Veiðan tilsamans | 134.747 | 134.185 | 1.146.385 | 1.247.645 | | |




## Útflutningur av feskum ísaðum fiski


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.188 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.673 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.183 | 14.426 | 12.107 | 10.578 | 9.503 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.265 | 13.208 | 9.374 | 11.874 | 4.162 |
| Annað | 5.209 | 7.707 | 8.968 | 11.794 | 13.387 | 11.773 | 11.982 |
| Íalt | 14.737 | 23.848 | 43.604 | 47.824 | 41.050 | 38.596 | 29.320 |

## Sporførisskipanin

### Nýtt partafelag er á stovn til at menna eitt tal-gilt undirstøði-kervi til sporførar skrásetingar

Í Marts mánaði 2006 varð partafelg sett á stovn, ið hevur til endamáls at menna eitt talgilt undirstøðikervi til sporførar skrá-setingar frá fiskivinnuni í Føroyum. Tað er Ráifiska-seljarafelagið og Ráfiskakeypara-felagið, ið eru farin at samstarva saman við Fiskimálaráðnum og Bitland. Partapeningurin er 500.000 krónur og eiga tey bæði feløgini Ráfiskaseljarafelagið og Ráfiskakeyparafelagið hvør sína helt. Menningarstovan hevur verið við í fyrireikingar arbeiðinum síðan á heysti 2003. Skipanin fevnir um skipini, landingarmiðstøðir, fiskamarknaðir, flutningsfeløg, framleiðsluvirkir, fiskasølur og útflutningsfeløg. Til várs verður skipanin royndarkoyrd og nakrar fyritøkur hava bjóðað seg fram at verða við til at royndarkoyra skipanina. Royndarkoyringin ferð at taka umleið ein mánað og eftir tað skuldi verði klárt til, at skipanin kann takast í brúk alment.

**Faktaboks**

Soleiðis virkar DNTS
Brúkarin fær atgongd til tað webbaseraða kt-sporingsskipanina DNTS (Digital National Traceability System) ígjøgnum pc-skermin.
Til tess at gera brúk av skipanini, skal brúkarin fyrst konvertera síni dokument, soleiðis at tey eru før fyri at tala við DNTS-dokumentini í einum sambarlium formati. Allir brúkarar hava ymiskar profilar, ið geva atgongdina til tey ymisku stigini av data.




Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo

| **Garnaskip** | **Ídnaðarskip** |
|---|---|
| Nim | Atlantsfarið |
| Drelnes | Carlton |
| Oknin | |
| Anita | **Línuskip** |
| Thor | Ågot |
| Vesturland | Jákup B |
| | Eysturoyingur |
| **Djúpvatnstrolarar** | Morgunstjørnan |
| Brestir | Sigmund |
| Rasmus Effersøe | Venus |
| Beinir | Stapin |
| Niels Pauli | Polarstjørnan |
| Phoenix | Helena |
| Sancy | Hoyvíkingur |
| Sjagaklettur | Jógvan Norði |
| Steintór | Pison |
| Suðringur | Kvikk |
| Roc Amadour | Grani |
| Vesturskin | Froya |
| Vesturvarði | Eystnes m/s |
| Rankin | Mascot |
| | Núpur |
| **Partrolarar** | Strandingur |
| Bakur | Fugltúgvan |
| Stelkur | Klakkur |
| Ametyst | Váðasteinur |
| Jaspis | Thomas Nygaard |
| Grønanes | West Frezer |
| Fjalshamar | |
| Nónhamar | **Nótaskip** |
| Borgarin | Christian í Grótinum |
| Navarin | Norðborg |
| Safir | Jupiter |
| Smaragd | Høgaberg |
| Vesturtúgva | Fagraberg |
| Fram | Saksaberg |
| Vestmenningur | Finnur Fríði |
| Polarhav | Tróndur í Gøtu |
| Kallsevni | |
| Grímur Kamban | **Verksmiðjutrolarar** |
| Stjørnan | Enniberg |
| Nesborg 1 | Vesturvón |
| Bliki | Skálaberg |
| Columbus | Sundaberg |
| Nornagestur | Atlantic Navigator |
| Vesturbúgvin | Ran |
| Eysturbúgvin | |
| | **Rækjuskip** |
| **Smáir trolarar** | Fríðborg |
| Raðhamar | Havborg |
| Jens Leon | Arctic Viking |


Gongin 10 Postsmoga 361 FO-110 Tórshavn Tlf. 311 800 Fax. 320 380 E-mail: shipown@post.olivant.fo